ikki so góðir og álítandi, at tað var hugsningur um at búgva hinumegin fjørðin. Nemingarnir komu til Klaksvíkar mánamorgun og fóru til hús aftur fríggjakvøld.

Í 1980 var deild av HF skeiðnum í Klaksvík sett á stovn við Gøtugjógv. Í 1982 vórðu fyrstu studentaskúlanæmingarnir tiknir inn á nýstovnaða studentaskúlan í Eysturoy. Upptøkuøkið var Norðoyggjar, Eysturoy og Streymoy suður til Hósvíkar.

Ternan varð sett í sigling um Leirvíksfjørð á sumri í 1980. Hetta skipið saman við bygdarleiðum vóru týdningarmikil grundarlag undir skúlanum, sum í nýggjari tíð hevur verið orsøkin til styrkt samband millum Eysturoy og Norðoyggjar á skúlaøkinum. Seinni hava eisini Handilsskúlin á Kambsdali og Tekniski skúlin í Klaksvík verið við til at røkt hesa uppgávuna.

Ungdómarnir, sum hava ferðast aftur og fram um Galvin, hava verið nógvir. Nýggj sambond eru kveikt, og um tað ikki hevði verið orsaka av forðingini, sum fjørðurin hevur verið, so hevði sambandið sæst aftur í uppaftur meiri virksemi, enn tað hóast alt hevur verið.

Neyðin hevur verið at leggja alt til rættis eftir samferðsluni. Síðsti túrtur úr Klaksvík hevur seinastu árini verið klokkan 22.15, og síðsti túrur hevur verið av Leirvík klokkan 23.00. Nú verður ikki neyðugt at hugsa í klokkutíðum. Tað er ikki neyðugt at trýsta eitt sindur eyka á naglan fyri at røkka ásetta tímanum. Vit fara undir ferðina, tá ið vit eru klár, og vit fara til hús aftur, tá ið vit eru liðug. Eisini jóladag, nýggjársdag, langa fríggjadag og páskadag, tá ið tað annars hevur verið steindeytt á almennu farleiðini um Leirvíksfjørð.

## Bilferjurnar

Politiski myndugleikin royndi leingi at kroysta norðoyingar at ferðast yvir land. So leingi sum ferðamaðurin kendi beinleiðis sambandið vera ómakaleysari rein almenna trýstið ikki við. Íløgurnar í beinleiðis sambandið vóru í áttati árunum væl minni, enn tær vóru í farleiðina yvir land, og nú eru tað longu nógv ár síðani, at valið ímillum at ferðast beinleiðis og yvirland hvarv. Harvið datt hugtakið at ferðast yvir land eisini burtur.

Dúgvan er síðsta skipið, sum røkir farleiðina millum Klaksvík og Leirvík. Hon er eitt av størstu førunum, sum hevur siglt millum Klaksvík og Eysturoy. Síðst í áttati árunum vóru Smyril og Teistin onkur stutt skifti avloysaraskip. Tá varð siglt millum Klaksvík og Gøtu. Plássið var nógv, og talið á ferðafólkum og bilum eksploderaði. Niðurbundna potentialið kom til sjóndar. Ongum nýttist at setast aftur, tí hann fokuseraði upp á møguleikan, at tað ikki fór at verða pláss, tá ið farast skuldi hin vegin aftur.

Soleiðis var tað eisini, tá ið esturlendska Scania onkur skifti loysti av. Tá varð fyri tað mesta siglt millum Klaksvík og Fuglafjørð. Ikki so galið skip, men tað kendist meiri heimligt, tá ið Dúgvan aftur var at síggja.

Norðoyingar høvdu eitt sindur ilt við at taka Dúgvuna til sín. Hon var ætlað farleiðini millum Skálafjørðin og Havnina, og har var hon nógv avhildin. Ferðafólkini norðan fyri vildu leingi heldur hava Ternuna. Men so við og við vann Dúgvan. Tað var so rímuligt. Umborð á henni rúmaðust væl fleiri bilar enn umborð á Ternuni, og umstøðurnar hjá ferðafólkunum hava verið munandi betri umborð á Dúgvuni, enn tær hava verið umborð á Ternuni, og so hevur tað sjálvandi havt alstóran týdning, at Dúgvan skikkar sær so nógv betri, enn Ternan hevur gjørt tað.

Ternan er einasta skipið, sum er teknað og smíðað við til endamáli at røkja siglingina um Leirvíksfjørð. Hon varð smíðað á Tórshavnar skipasmiðju, og hon var liðug í 1980. Nú ferðirnar um Leirvíksfjørð av álvara eru farnar at ganga undan, hevur ein partur av prátinum á ferðini til og á og av Galvinum snúð seg um, hvussu lítið tað varð ætlað til, tá ið Ternan fyri 27 árum síðani varð bygt, og tað varð roknað við, at hon í mong ár skuldi røkja siglingina millum Eysturoy og Klaksvík. Hon hevur verið ov stutt, og hon hevur verið ov smøl. Havnarumstøðurnar í Leirvík, sum tær vóru fyri meiri enn fjórðings øld síðani, mundu telja nógv, tá ið tekningin varð góðkend, hevur tað verið breið semja um umborð.

Tað var valár, tá ið Ternan varð sett í sigling, men tað varð neyvan tilætlað, at hon gjørdist so hent valagn. Hon fór í sigling á sumri. Av røttum skuldi løgtingsvalið ikki verið fyrrenn í 1982, men samgongan skrædnaði og so var val í november í 1980 – í ótíð.

Fyrra Ternan kom í 1970. Løgtingsval var eisini í 1970, og Ternan, sum frammanundan hevði itið Wiking og hevði siglt millum Brunsbüttel og Cuxhaven við munnan á Elben, kom til landið sjálvan valdagin, sum var 7. november. Tað mundi neyvan vera púra ótilvitað!

## Tá ið byrjað varð í smáum

Inntil 1908 var allur flutningur við ferðafólki, posti og farmi um Leirvíksfjørð við árabátum og harvið ikki formliga skipaður. Hetta árið keypti postmaðurin í Fuglafirði, Hans Jacob Petersen, tveir deksbátar. Annar teirra, Alma, sigldi við posti, ferðafólki og farmi millum Fuglafjørð, Leirvík og Klaksvík.

Í 1935 yvirtók J. F. Kjølbro siglingina millum Fuglafjørð, Leirvík og Klaksvík. Kjølbro røkti hesa siglingina við Britons Pride, sum eisini sigldi millum Klaksvík og Havnina.

Hugo Gardar í Klaksvík og partafelagið hjá honum røktu í mong ár sigling um Leirvíksfjørð. Hugo átti deksbátin Polaris og seinni eisini Barsskor. Teir sigldu úr Klaksvík og norður í Kalsoy og Kunoy og eisini til Leirvíkar og longur norður í oynna. Hugo Gardar nýtti fyrrapartin av seksti árunum Britons Pride á farleiðini um Leirvíksfjørð. Í 1967 keypti Hugo Gardar Vesturleið, sum hevði siglt úr Vágum og til Havnar. Vestsurleið var upprunaliga fiskiskip og bygt í 1945. Hugo Gardar gav Vesturleið nýtt navn. Tað var Gardar (eftir pápanum), og hetta skipið sigldi um Leirvíksfjørð fram til síðst í 1970, tá ið Ternan kom. Landið keypti Gardar, og harvið var leikluturin hjá pf. Hugo Gardar í siglingini um Leirvíksfjørð liðugur.

## Bilarnir og trygdin

Við nútíðar eygum kennist tað heilt ófatuligt, at tað skal hava borið til at siglt um Leirvíksfjørð við bátum og skipum, sum ikki vóru ætlað til bilflutning.

Bilarnir vóru fáir, og vegirnir vóru vánaligir. Á dekkinum á Pride, sum sigldi millum Klaksvík og Havnina bar til at hava tveir ella kanska tríggjar bilar standandi, tá ið ættin var góð. Smyril, sum varð bygdur í 1967 á Tórshavnar skipasmiðju, sigldi eitt sindur til Klaksvíkar. Har kundu kanska fýra bilar hivast umborð. Størri bilar og akfør vórðu flutt við Tjaldrinum og kanska onkrum sandbáti, tá ið veðrið var gott.

Ternan, sum kom 7. november í 1970, var orsøk til rættuligt frambrot í bilflutninginum. Í oktober 1967 var Tróndur settur í sigling millum Havnina og Skálafjørðin. Hetta var bilferja. Ternan rúmaði fimtan bilum. Kapasiteturin var harvið fimmfaldaður! Rampur vóru ikki í Leirvík og Klaksvík. Bilarnir vórðu hivaðir umborð og í land, meðan ferjulegur við rampum vórðu gjørdar. Meðan teir arbeiddu í Leirvík, sigldi Ternan til Fuglafirðar.

Nútíðin undrast um hvussu ólagaligt sambandið var, hóast talan var um stóran framburð fyri 36 árum síðani. Ferðafólkini fegnaðust um framburðin, og manningarnar gjørdu alt tað, sum teir vóru mentir fyri at fáa tað at glíða.

Fyri einum ættarliði síðani bar so mangt til, sum ikki ber til í dag. Tað eru so mong dømi um hetta. Bygningar, sum fólk og fæ hevur verið í hvønn einasta dag, verða brádliga avgyrdir, og menn fara í serligum búnum og við snorkli og fløskum inn at taka asbestplátur burtur. Eftir at børn hava spælt púra vanliga í túnum og á teigum so at siga altíð, verða økir gyrd av, og serligar maskinur og seramboð verða nýtt at grava mold, sand og eyr burtur, tí undirlendið er dálkað.

Stabiliteturin á sjónum hevur verið í fokus seinnu árini. Ternan frá 1970 rúmaði fimtan bilum, og teir royndu at stúva fyri at bíðitíðin skuldi vera sum minst. Tá ið Ternan sang svanasong í Skálafjarðarsiglingini var ikki loyvt at hava ein tann einasta bil á dekkinum.

Portrið á hesi Ternuni var soleiðis, at tað varð latið upp so at siga inn í skipið. Tá ið skipið var væl stúvað við bilum, sigldi Ternan um fjørðin við opnum portri! Tað bar væl til, og alt gekk væl. Men tað, sum bar til fyri stórum tredivu árum síðani, ber ikki til longur. Krøvini eru mangar ferðir strangari, og kortini kemur tað kanska oftari fyri nú, enn tað gjørdi, tá ið krøvini vóru linari, at óhapp koma fyri.

## Ímyndirnar

Tá ið Britons Pride fór at sigla um Leirvíksfjørð, og tá ið bátarnir hjá Hugo Gardar røktu siglingina, vóru tað klaksvíkingar, sum mannaðu skip og bátar. Hesi seinnu árini hava fremmanda fólk eisini verið í manningini. Felags fyri øll hevur verið, at tey hava røkt arbeiðið samvitskufult og til lítar. Tey fyrru árini var ein manning, og teir sigldu allar túrarnar. Hesi seinnu árini hava manningarnar til hvørt skipið verið fleiri, og seinastu árini hava tað støðugt verið tvey skip á farleiðini.

Andlitini umborð hava verið nógv. Eingin tekur tað kortini illa upp, um tað verður sagt, at tað í eftirkrígstíðini vóru tveir, sum serliga myndaðu farleiðina um Leirvíksfjørð. Teir báðir vóru systkinabørn. Jacob Joensen ella Jákup hjá Jakku á Geilini førdi Barsskor, og hann varð stýrimaður á Ternuni. Skjótur og fryntligur og beinrakin var hann umborð, inntil hann var 70 ára gamalur. Jacob er føddur í 1919. Ferðirnar hjá honum um Galvin vóru óteljandi.

Hin er Lindi Gardar. Hann er sonur Hugo Gardar, sum leingi hevði ábyrgdina av farleiðini um Leirvíksfjørð. Hugo og Jakku á Geilini vóru brøður. Lindi førdi bæði fyrru og seinnu Ternuna, sum hava røkt sambandið um fjørðin. Hóvligur, sáttligur og tryggur á brúnni. Lindi, sum noyddist at leggja frá sær orsaka av sjúku fyri fleiri árum síðani, er føddur í 1936.

Nú verður ikki siglt um fjørðin og um Galvin. Í knappliga hundrað ár hevur skipað ferðsla verið henda vegin. Tað hevur roynst væl. Okkurt óhappið hevur verið, og tað er komið fyri, at onkur persónur er komin til skaða, men eingin hevur mist lívið á hesi farleiðini. Mest ótespiligi túrurin mundi tann vera í 1967, tá ið stór fylling í Leirvík tók tveir bilar á sjógv. Tað eydnaðist bilstjóranum at sleppa úr øðrum bilinum, áðrenn hann varð tikin útav. Jacob var á brúnni á Britons Pride, og við góðum hegni eydnaðist teimum at fáa hin mannin úr bilinum og upp á dekkið.

Spurningurin er so, hvussu tað fer at verða við trygdini, nú vit, sum ferðast norðureftir, bara fara at hyggja yvir á Galvin, tá ið vit eru komin úr Leirvíkstunnlinum, og áðrenn farið verður niður í Norðoyatunnilin. Tað verður sagt, at eingin kom álvarsliga til skaða øll tey árini, tá ið ferðslan yvir land fór umvegis Leirvíkslíð. Leirvíkstunnilin varð gjørdur fyri at betra um trygdina. Hann hevði ikki verið so leingi opin, tá ið ferðslan tann vegin kravdi mannalív!

Vónandi fer tað at eydnast væl við farleiðini undir Leirvíksfirði. Syðradalsmenn, sum røkta seyðin, leirvíkingar og klaksvíkingar og onnur, sum dyrgja, og fiskimenn fara framvegis at heilsa upp á Galvin. Men hjá ferðafólkum til og úr Norðoyggjum er sambandið við Galvin farið í søguna.



*Gardar bakkar frá kei á Stongunum í 60'unum*



*Ternan sum varð sett í sigling í 1970*



*Ternan hevur sett ferð á úteftir vánni miðskeiðis í 70'unum*



*Ternan hevur sett ferð á úteftir vánni miðskeiðis í 70'unum*